## Bin Laden slapp

Amerikanararnir kundu helst fingið fatur á yvirgangsleiðaranum Osama bin Laden stutt fyri árslok í 2001. Tað sæst í einari frágreiðing hjá amerikanska Senatinum. Frágreiðingin umrøður, hvussu amerikanararnir bumbaðu fjallalendið Tora Bora í Afghanistan í november og desember í 2001, tí bin Laden fjaldi seg har. Hinvegin vildi Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, ikki senda hermenn at leita eftir bin Laden. Úrslitið var, at tann 16. desember fór bin Laden óskaddur til gongu úr Tora Bora um markið til Pakistan, og har er hann helst enn, stendur í frágreiðingini hjá Senatinum.



## Dubai-kreppan kostar

Tað eru ikki bara bankar í Vesturheiminum og aðrastaðni, sum kunnu missa nógvar pengar av figgjarkreppuni í Dubai. Fleiri av teimum kendu stjørnunum í ítróttar- og filmsheiminum kunnu eisini vænta at missa. Millum teirra, sum eru í vandabólkinum, er fótbóltsstjørnan David Beckham og konan Victoria, filmshjúnini Brad Pitt og Angelina Jolie og tann kendi sjónvarpskokkurin Gordon Ramsey. David Beckham er ikki tann einasta fótbóltsstjørnan, sum hevur sett pengar í verkætlanir í Dubai. Onnur kend nøvn eru Michael Owen, Andy Cole og David James.

# Jólamaðurin kom av himni



*Nógv vóru bilsin tá jólamaðurin kom úr luftini*

**Leygardagin kom ljósið av himni. Men ikki tað ljós, vit vanliga hugsa um í jólatíðini. Hesaferð var tað jólamaðurin, sum kom lorandi niður úr eini lyft og tendraði jólatræið á Vaglinum í Havn**

ADVENT

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Veðrið var av tí allarbesta við eitt sindur av følvi og umleið null hitastigum.

Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen og Bjarni Bæk, dómpróstur, hildu røðu og ynsktu jólatíðini vælkomnari.

Heðin Mortensen endaði røðu sína við at biðja alla fjøldina rópa »Jólamaður tendra træið«, og tá hoyrdist vælkenda »HO-HO« uppi frá lyftini hjá Tórshavnar sløkkiliðsbili.

Jólamaðurin kom í leysari luft við einum ljóssvørði. Eftir einari løtu av spenningi, eydnaðist tað honum at tendra træið.

Í ár hevur jólatræið 100 perur fyri at hátíðarhalda 100 ára dagin hjá Tórshavnar kommunu.



*Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen helt røðu, og minti fjøldina á, at besta jólagávan er ikki at fáa, men at geva*



*Nógv fólk vóru komin oman í Miðbýin at síggja træið verða tendrað*



*Børnini fingu karamellur frá jólamanninum*



*Tórshavnar Hornorkestur spældi vælkend jólaløg*